FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 19. mars 2021
J. nr.: 21/00117
Viðgjørt: MM

Svar upp á fyrispurning nr. 52-098/2020 frá Hervør Pálsdóttir, løgtingskvinnu, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um Kirkjubøarvegin

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær er ætlanin at dagføra Kirkjubøarvegin

Svar:

Verandi vegur til Kirkjubøar er smalur, einbreytaður og ikki tíðarhóskandi. Vánaligt sýni er í støðum og tali á víkiplássum er ikki nøktandi. Um summarið vitja nógv ferðafólk bygdina og ferðslutrýstið er tí stórt hesa tíðina. Nógvir bussar koyra eisini til bygdina í hesum sambandi og elvir hetta til trupulleikar, um fleiri bussar møtast á vegnum samstundis.

Ætlanin er tí at bøta um trygdina og framkomuleikan á Kirkjubøarvegnum. Í 2021 er ætlanin at asfaltera strekkið frá íbindingini við Gomlurætt og suður til endan á landsvegnum.

Áðrenn asfaltarbeiðið fer í gongd skal tryggjast, at yvirflatuvatni setur frá í ovara borði. Hetta verður m.a. gjørt við at reinsa gravir og tryggja, at verandi tvørrennur kunnu taka hóskandi nøgdir av vatni. Nýggjar tvørrennur verða gjørdar, har tað er neyðugt. Eisini er ætlanin at gera tveir nýggjar busslummar, ið ger tað lættari hjá bussum at møtast á vegnum.

Landsverk fer væntandi í apríl at kanna styrkina á undirlagnum á vegnum fyri at meta um, hvørja ávirkan tað vaksandi ferðslutrýstið hevur havt á asfaltið og vegkassan. Í hesum sambandi verða tiltøk væntandi sett í verk fyri at tryggja, at vegurin ikki fer ov illa.

Tinganes, 19. mars 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum